# Opel Corsa GSi



Opel Corsa GSi við 17" hjólum og senkaðum undirvogni


Innan hevur Corsa GSi sína egnu GSi-innrætting við t.d. sportsetrum, leðurratti og alu-pedalum

**Opel Corsa kemur nú í eini GSi útgávu við 1,6 litra motori við turbo og 150 hk og eini toppferð upp á 210 km/t. Bilurin kemur á marknaðin eftir summarferiuna**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nýggi Opel Corsa, sum hevði heimspremieru á The British International Motor Show í London í fjør, kemur nú eini GSi útgávu við 150 hk og turbo. Bilurin koyrir frá 0-100 upp á 8,1 sekund og toppferðin er 210 km/t.

Corsa GSi hevur elektroniska servostýring, sum lagar seg eftir ferðini, og undirvognurin er senkaður í mun til Corsa 1,4 Sport (18mm framman og 15 mm aftan).

Corsa fæst eisini í eini útgávu við størri motori. Talan er um Corsa OPC við turbo og 192 hk. Hesin koyrir frá 0-100 km/t upp á 7,2 sekund og toppferðin er 225 km/t.

Fyri nógvum árum síðan vóru Opel kendir fyri sínar GSi útgávur av t.d. Kadett og Manta, so hesin Corsa vekir helst gomul minnir hjá teimum, sum í ungdómsárunum høvdu ein Opel GSi.

# Nýggjur Mazda6 í Frankfurt

Mazda koma nú við fleiri stórum nýggjheitum. Fyrst eru tað Mazda2 og CX-7, ið koma á evropeiska marknaðin í heyst, og ein heilt nýggjur Mazda6, sum hevur heimspremieru á altjóða bilaframsýningini "Frankfurt Motor Show", sum verður frá 11. til 23. september 2007.

Tá hesin Mazda6 kemur á marknaðin, avloysir hann núverandi Mazda6, sum er ein av best umtóktu bilum yvirhøvur. Núverandi Mazda6 fæst bæði sum sedan, stationcar og í eini sera sportligari MPS útgávu við 260 hk.

Nýggi Mazda6 er eyðkendur av sportligum designi, sportligum koyrieginleikum eins og kvaliteti og trygd á høgum støði, umframt at hann eisini er umhvørvisvinarligur, verður sagt í tíðindaskrivi frá Mazda Motor Danmark.



Nýggi Mazda6 hevur heimspremieru á altjóða bilaframsýningini "Frankfurt Motor Show" í september

## Toyota størst

Fyrra hálvár í ár komu Toyota fyri fyrstu ferð á toppin sum heimsins størsti bilaframleiðari við eini sølu upp á 90.000 bilar meira enn General Motors, sum hava verið heimsins størstu. Hetta hóast General Motors eisini hava havt framgongd.

Samstundis kunngerða Interbrand og Businessweek í USA, at Toyota er tað virðismiklasta bilmerki í heiminum við einum virði upp á 183 milliardir krónur og sum nummar seks á listanum yvir tey virðismiklastu merkini í heiminum yvirhøvur. Fremst eru tey trý amerikonsku feløgini Coca-Cola, Microsoft og IBM. Aftan á Toyota er Mercedes-Benz nummar tvey í bilaídnaðinum við einum virði upp á 129 milliardir krónur.